FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

7. mars 2025
Mál: 25/05767-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-089/2024

Svar upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-089/2024 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Dennisi Holm, landsstýrismanni, um trolfiskiskap eftir svartkalva

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hava Føroyar størstu trolmeskavídd í Norðuratlantshavi, tá tað snýr seg um fiskiskap eftir svartkalva?
2. Hví hava Føroyar valt hesa trolmeskavídd til henda fiskiskap?
3. Hví brúka tey ymsu londini ymiska meskavídd til henda fiskiskap?
4. Ætlar landsstýrismaðurin at taka hetta upp við Havstovuna, soleiðis at føroyingar hava betri treytir at fiska svartkalva, serliga har fiskað verður av sama svartkalvastovni, báðumegin markið?

Svar:

Til spurning 1
Eftir grein 4 í kunngerð nr. 193 frá 29. desember 2017 um fiskiskapin í føroyskum sjógvi við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum, kann einki fiskifar nýta trol, sum hevur smærri meskar enn 145 mm. Í greinunum 14-17 í kunngerðini eru tó undantøk, sum loyva trolarum at brúka minni mesk enn 145 mm í beinleiðis veiði eftir ávísum fiskasløgum. Svartkalvi er ikki undantikin.

Eftir hesum, og sambært mínum upplýsingum, eru tað Føroyar og Kanada – sum í sínum regluverki hava størstu trolmeskavídd (145 mm), tá tað snýr seg um fiskiskap eftir svartkalva.

Tá samanborið verður við onnur lond, er tó vert at hava í huga, at ásetingarnar um trolmeskar aðrastaðni kunnu vera øðrvísi settar saman enn tær føroysku. Til dømis siga grønlendsku reglurnar, at í veiði eftir svartkalva við troli er minstamátið fyri

meskavídd 100 mm í undirveingjunum, meðan meskavíddin í restini av trolinum skal minst vera 140 mm. Føroysku reglurnar galda fyri alt trolið.

Til spurning 2
Tað hevur ikki eydnast at fáa til vega upplýsingar, fyri á nøktandi hátt at kunna svara hesum spurninginum um, hví Føroyar hava valt hesa trolmeskavídd fyri svartkalva.

Reglan um, at tað ikki er loyvt at brúka smærri meskar enn 145 mm, hevur verið galdandi síðani fyrst í 1990-unum. Áðrenn tað var loyvt at brúka smærri meskar. Sum skilst, var broytingin til størri meskar ein liður í teimum nýskipanum, sum landsstýrið fyrst í 1990-unum setti í verk fyri at bøta um stovnsrøktina í fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum. Endamálið við minst loyvdari meskavídd í troli er vanliga, at fiskur undir ávíst minstamát skal kunna verða sílaður frá, meðan tóvað verður, og at ein á henda hátt stuðlar undir, at veiðan av smáum fiski verður sum minst.

Til spurning 3
Tað hevur ikki borið til at útvega upplýsingar, greiningar ella annað, sum kann vera grundarlag undir at svara hesum spurninginum um, hví londini í Norðuratlantshavi brúka ymiska minst loyvdu meskavídd í fiskiskapinum eftir svartkalva við troli.

Eg kann bert staðfesta, at lond brúka ymiskar reglur um trolmeskavídd, og at reglurnar í Føroyum (145 mm) ikki eru tær somu sum í t.d. Noreg (130 mm), Bretlandi og Íslandi (135 mm), Grønlandi (100/140 mm) ella í altjóða sjógvi í NAFO-økinum (130 mm).

Svartkalvin á leiðunum við Føroyar, Ísland, Eysturgrønland og vestan fyri Skotland verður roknaður sum ein og sami stovnur, sum er í sjóøkjunum hjá fleiri londum. Ongar felags ásetingar eru tó um fiskiskapin, undir hesum tekniskar reglur um reiðskap o.a.

Til spurning 4
Í løtuni eru ongar ítøkiligar ætlanir um at broyta reglurnar um meskastødd í fiskiskapinum við troli í føroyskum sjógvi. Samskift verður regluliga við Havstovuna í sambandi við at skipa fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum, og spurningurin um meskavídd í troli fer at verða tikin upp.

Sirið Stenberg
landsstýrisfólk